# Arnfinnur Olsen, Fuglafjørður sjeytifimm ár



Frá svimjigørpunum: In a yellow Submarin ljóðar ein kvøða til ein snøggan fuglfirðing, nú hann rundar "Kaphorn". Hugfarsligt er hvønn leygarmorgun, at møtast í vátum vatni í svimjihylinu í Fuglafjarðar skúla og svambla eina góða løtu og fáa eitt gott prát undir vatni, í krókum í hylinum og á miðjum vatni, um heimlig viðirskifti, fullveldi, seyð, skipsferðir, lærara-verkfallið, laksavirus, tónleik og sjálvandi hvussu ofta svimjast skal aftur og fram fyri at vera ein rættur pensjónistur.

Ikki allir eru pensjónistar, ið svimja leygarmorgun. Einir tríggir hava fingið serloyvi frá Finni, og hetta kenna teir sum eina tign í hesum heimsins fínasta svimjifelag. Teir hava fingið "dispensatión" og kenna seg væl millum teir, ið bera tað rætta pensjónistaheitið bæði oman á vatni og undir vatni. Her er rættur hugburður til tað, sum fyrifert henda morgun.

Ikki einans svomið verður, nei, eftir vátu ferð tína undir vatni og oman á vatni verður borðreitt á lærarastovuni. Einki er tilvildarligt - "stílurin" hevur alt at siga. Tú verður boðin til búgvið borð - gott kaffi, mjólk, morgunbreyð, ost og gott margarin stendur so borðbart á miðum langborði og bíðar eftir tær. Her sessast væl úr hondum greiddir pensjonistar, hóvsamir, hóligir og lætta ljóði av. Ein so frálík talingarløta. Hárið tornar, meðan tú fært tær ein heitan duss, ja, satt at siga tær strýggjurnar, sum tú fórt av songini við, eru tær, sum her verður hugsað um. Ikki smáhárini, ið liggja eftir á koddanum, tí teimum er ikki lív laga. Nei, her er angi av sápulúti frá alheimsmarknaðinum, ið glinsar á føgrum pensjonistafeldum, sum hava sæð sólina rísa og seta fleri túsund ferðir.

Henda stevna er eisini ein góð mentanarstevna við íblástri frá farnum døgum. Søgur úr hugaheimi hjá monnum, ið væl og virðisliga greiða frá egnum lívi, lívsroyndum og ávikum - natúrliga og sjálvandi málsliga rætt. Fólkið er fyrverandi sjómenn, seyðamenn, lærarar, maskinmeistarar, smiðir, deknar og skiparar. Hetta er miðleingjan í hesum fraga hópi, sum hevur borið samfelagnum uppi í ár so mong.

Væl gongst teimum at halda sær uppi, og blámin stendur frá , tá ið hestakreftirnar snurra í hylinum. Hópurin ber tað rætta heiti: In a yellow Submarin.
Arnfinnur Olsen hevur í eini 15 ár staðið fyri hesum frálíka tiltaki. Fleiri av hesum monnum, sum vóru við frá fyrstan tíð, hvíla undir grønu torvu. Tað dettur burtur av, men tað legst eisini til.

Finnur er so sera musikalskur. Hann hevur spælt horn, sungið ( syngur enn), spælir enn klaver, banjo og guitar. Hann prýðir dámurnar í bygdini við tí fínasta skrúðnum, tú kanst hugsað tær úr hvalabeini. Hetta eru: hálsprýði, oyrnaprýði, ringar, armbond, brævknívar og onnur prýði, sum hann listaliga evnar úr hvalatonnum,.og verður henda tilevning maktað sum nakað serskilt í bygd okkara honum til rós og okkum øðrum at gagni.

Pensjonistasvimjibólkurin: In á yellow Submarin ynskir tær til lukku við teimum sjeyti- fimm árunum páskaaftan og takka fyri tær frálíku løturnar undir vatni, oman á vatni og á lærarastovuni hvønn leygarmorgun so snimma.

**Heilsan**
**Frits - svimur við serloyvi**


Fótbóltur 2000

á torginum uttanfyri Hornið

Kl. 17.00 tippa John Petersen, B36 og Magni Jarnskor, GÍ



HORNIÐ

Sosialurin - 311820


Yngd
Nr. 15 2000 SOSIALURIN



síða 17

## Fleiri litir takk

síða 18 og 19
Glorybox og prát og roks

síða 20
TAXI av verkstaðnum út í heim

síða 21
Hitlistar og svara so!

baksíðan
Fløguumæli